SAMBAND
magnus gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tl. 341800

RÁS 2 BILRADIO
HÓSDAGIN KL. 16:10



*Poul Laust Christiansen frá bil.fo*

# Heimasíðan bil.fo aftur virkin

**Frá í dag av er heimasíðan bil.fo aftur virkin eftir at hava ligið still í meira enn eitt ár**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Heimasíðan bil.fo verður í dag lanserað í heilt nýggjum hami. Tað er Poul Laust Christiansen í Hvalba saman við Dánjali Vestergaard og Bárði Bærentsen, sum eiga og reka heimasíðuna.

Poul Laust Christiansen frá bil.fo sigur, at heimasíðan er gjørd til at fólk kunnu seta sín brúkta bil til sølu har. Síðan er brúkaravinarlig, og tað er t.d lætt at samanbera bilarnar á síðuni viðvíkjandi prísi, motorstødd, árgangi o.s.fr. Tey, sum ynska at selja sín bil, stovna bert sín egna profil og skriva tekst og leggja mynd við.

Tað kostar 299 krónur at seta bilin til sølu á bil.fo. Tá kann hann vera har, líka til hann er seldur.

Til ber at gjalda við gjaldskorti inni á síðuni.

Til ber eisini til at velja, um bilurin skal koma við í eina litlýsing hjá bil.fo í bløðunum. Sum eitt heilt serligt byrjunartilboð kosta teir fyrstu 50 bilarnir bert 1 krónu pr. stk at leggja út.

Poul Laust sigur, at ætlanin er at víðka og útbyggja heimasíðuna til ein bilaportal við tíðindum og videoklippum.

# Nýggjur Mazda5



*Mazda5 verður frumsýndur í eini heilt nýggjari útgávu á Genéve Motor Show í mars*

**Á bilaframsýningini í Genéve í mars frumsýna Mazda ein spildurnýggjan Mazda5, sum eftir ætlan kemur á marknaðin í heyst**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Mazda5 verður frumsýndur í eini heilt nýggjari útgávu á Genéve Motor Show í mars. 2.0 bensinútgávan av Mazda5 fær i-stop (stop & go) og eina nýggja innspræningsskipan sum saman við 6-trins girkassanum gevur 15 prosent lægri bensinnýtslu og tilsvarandi lægri CO2-útlát enn forgangarin. Sambært Mazda verður hesin tann mest økonomiski MPV í sínum klassa.

Núverandi Mazda5 hevur verið á marknaðinum síðan 2005, tá hann avloysti tvey Mazda modell: Mazda Premacy og Mazda MPV.

# Ford størst í Danmark




*Mest seldi persónbilurin hjá Ford á danska marknaðinum í 2009 varð Fiesta*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Við einum marknaðarparti upp á 10,4 prosent gjørdist Ford mest selda bilmerki í Danmark í 2009.

Ford hevði stóran vøkstur á danska marknaðinum, og tann mest seldi persónbilurin hjá Ford varð Fiesta, sum fór frá einum marknaðarparti upp á 0,9 prosent í 2008 til 2,7 prosent í